

Huglagsmálningar í Ribarhúsi

Málningaframsýning verður í Riberhús við Marie Ravn Sørensen, Onnu Hansdóttir og Jakubinu Hansson frá 5. juni til 23. juni.

Hesar kvinnur úr Havn hava fleiri ára royndir við skeiðum bæði í Føroyum og uttanlands.

Tær hava luttikið við framsýningum á millum annað:

Smiðjuni í Lítluvík, Ólavsøkuframsýningum, hjá Lions, í SMS, hjá Dugna á Hjalla.

Vanliga kemur íblásturin til myndirnar úr teirra egna umhvørvi og huglag.

Opið er:
Gerandisdagar frá kl. 15.00 til 17.30
Leygardag frá kl. 11.00 til 15.00
2. hvítusunnudag frá kl. 15.00 til 18.00
Leygardag 14. juni frá kl. 11.00 til 16.00

Fernisering verður 5. juni frá klokkan 16.00 til 18.00. Fyrirreikararnir sigar, at okkurt leskiligt verður til ábit og at øll eru hjartaliga vælkomin at støkka inn á gólvið.

Gamlir Fóstbræður á vitjan

Vit kunnu vænta okkum eina av teimum heilt góðu konsertunum komandi vikuskiftið í Vesturkirkjuni og í Skúlanum við Ósanna í Klaksvík.

Gamlir Fóstbræður úr Íslandi koma á føroyavitjan hetta vikuskiftið og hava konsertir í Vesturkirkjuni leygardagin klokkan 17. Sunnudagin hava teir konsert í Skúlanum við Ósanna í Klaksvík klokkan 15.30.

Fóstbræður, sum hava gamlar røtur, er eitt av teimum bestu manskórunum í Íslandi, og eru Gamlir Fósbræður er ein sálvstøðugur partur av hesum kóri.

Á skránni vera íslendskir og norðurlendskir sangir m. a. nakrir av teimum best dámdu íslendsku kórsangunum.

Ein av kendastu klaverleikarum í Íslandi, Jónas Ingimundarson, spælir á klaver til nakrar av sangunum.

Tenorurin Þorgeir J. Andrésson, sum hevur sungið við íslendsku opruni, er solistur á Føroyaferðini hjá Gamlir Fóstbræður.

Sangstjóri hjá er Árni Harðarson, sum eisini er komponistur og er stjóri á Tónlistaskúla Kópavogs, har m.o. Jóannes Andreasen hevur gingið. Árni Harðarson er eisini sangstjóri hjá Karlakórinum Fóstbræður, sum hevur vitjað í Klaksvík fyrr og annars ferðast víða um í heimi.



HÓSDAG

11/14 °C



4-9 m/s 4-9 m/s

Seinnapart:
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.

FRÍGGJADAGIN

10/13 °C



1-6 m/s 3-8 m/s

Lot til andøvsgul av landnyrðingi, seinnapartin lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 14 og 17 stig.

LEYGARDAGIN

10/13 °C




5-10 m/s 1-6 m/s


Fleyr til gul av eystri, um kvøldið veksur hann vindin av landsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 14 og 17 stig

Veðrið sunnudagin og mánadagin:
Sunnudagin andøvsgul av eystri og regn, mánadagin minni vindur av suðri og yvirhøvur turt, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 17 stig.

LUFTTRÝSTIÐ




Veðrið hósnáttina:
Ein hitabrúgv við Føroyar fer vestureftir.



Veðrið fríggjanáttina:
Hitabrúgvin vestanfyri Føroyar fer vestureftir.

HITALAG


fyri juni



Miðal 1961-1990: 7,0°C


AVFALL

fyri juni



Miðal 1961-1990: 70 mm

AVFALL 2014





Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið

VESTFALLSKYRRINDI

3/6: Mánin longst frá jørðini
5/6: Fyrra kvarter

Kelda: Almanakkin 2014

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
6. juni	01:46	14:19	01:46	14:19	01:46	14:19	01:46	14:19	01:46	14:19	01:46	14:19	11:34	-	01:46	14:19	01:46	14:19	01:46	14:19	01:46	14:19
7. juni	02:52	15:11	02:52	15:11	02:52	15:11	02:52	15:11	02:52	15:11	02:52	15:11	02:52	15:11	02:52	15:11	02:52	15:11	02:52	15:11	02:52	15:11
8. juni	03:30	15:50	03:30	15:50	03:30	15:50	03:30	15:50	03:30	15:50	03:30	15:50	03:30	15:50	03:30	15:50	03:30	15:50	03:30	15:50	03:30	15:50
9. juni	04:11	16:32	04:11	16:32	04:11	16:32	04:11	16:32	04:11	16:32	04:11	16:32	04:11	16:32	04:11	16:32	04:11	16:32	04:11	16:32	04:11	16:32
10. juni	04:54	17:17	04:54	17:17	04:54	17:17	04:54	17:17	04:54	17:17	04:54	17:17	04:54	17:17	04:54	17:17	04:54	17:17	04:54	17:17	04:54	17:17